Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

P/F Postverk Føroya
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Att.: Sofus Clementsen, stjóra

**Tórshavn 7. oktober 2010**

Journal nr.: 10/00160-12
Viðgjørt: SL/SR

**Avgerðarskriv - Avtala millum Prentmiðstøðina og Posta um útbering**

**Samandráttur**
P/f Posta (hereftir Posta) og P/f Prentmiðstøðin (hereftir Prentmiðstøðin) hava tann 19. juni 2010 gjørt avtalu um flutning av dagbløðum, útbering av gratisávísum og lýsingarbløðum og keyp av bilum og navni, umframt avtalu um útbering fyri SMS samtakið.

Avtalurnar hava við sær at útberingarvirksemi hjá Prentmiðstøðini er hildið uppat, og at tað hereftir einans er ein landsdekkandi skipað útberingarfyritøka eftir í landinum.

Posta hevur sent Kappingareftirlitinum umbøn um frítøku sambært kappingarlógini §9.

Posta er alment partafelag, ið hevur fingið konsession at reka postvirksemi í Føroyum.

Prentmiðstøðin er partur av Dimmalætting samtakinum. Virksemisøkið, ið er eftir á Prentmiðstøðini, er
1 prenting, grafiskar uppsetingar av ymiskum slag vm.

Viðkomandi marknaðurin er útbering av bløðum og lýsingum. Í einum málið, ið var til viðgerðar í vár, *"P/F Prentmiðstøðin klagar Posta fyri brot á kappingarlógina"* hevði Kappingareftrlitið ta meting, at Posta var marknaðarráðandi á hesum marknaði. Eftir at útberingarvirksemi hjá Prentmiðstøðini er hildið uppat er Posta at kalla einaráðandi.

Kappingareftirlitið er komið til ta niðurstøðu, at umrøddu avtalur, ikki eru fevndar av kappingarlógini § 6, stk. 1 um forboð ímóti kappingaravlagandi avtalum. Kappingareftirlitið metir, at grundarlag er til staðar at geva eina sokallaða "negativ-váttan" sambært kappingarlógini § 9.

**Avgerð**
Boðað verður frá:

- at innsendu avtalur sambært viðurskiftum, ið Kappingarráðið hevur kunnleika til, ikki koma undir forboðið í kappingarlógini § 6 stk. 1, og at tað sostatt ikki er orsøk at geva nøkur boð sambært § 6, stk. 4. og givið verður tískil ein váttan sambært § 9(negativ-váttan).

**Fyritøkurnar**
Prentmiðstøðin er partur av samtaki, ið inntil fyri kortum fevndi um um P/f Dimmalætting, P/f Prentmiðstøðina og P/f Føroya Prent[1]. Samtakið kundi veita eina heildartænastu innan grafiska framleiðslu,

[1] P/f Føroya Prent er leyst atknýtt felag, har Dimmalætting samtakið eigur 50%, meðan P/f Hestoy eigur 50%

prenting og útbering av reklamum. Í september 2010 er blaðvirksemið Dimmalætting selt burturúr og P/f Dimmalætting hevur skift navn og endamálið við felagnum er eisini broytt.

Virksemi hjá Prentmiðstøðini fevnir um prent av tíðindabløðunum Dimmalætting og Sosialinum umframt prent av øðrum bløðum, m.a. tilboðsavísum. Harumframt hevði felagið útbering av egnari framleiðslu og lýsingum, sum onnur hava framleitt.

Virksemi hjá P/f Føroya Prent fevnir um øll trý lið í grafiskari framleiðslu. Hesi eru undanprent (umbróting og uppseting), prent og liðugtgerð (t.d. bókframleiðsla, hefti og bløð).

Posta er alment partafelag sum hevur kjarnuvirksemi innan útbering av brøvum, bløðum, bóklingum og øðrum prentaðum sendingum, umframt pakkaflutning. Fyritøkan hevur eisini samstarvsavtalu við Suðuroyar Sparikassa um sølu av fíggjartænastum. Posta hevur konsessión til postvirksemi við tilhoyrandi rættindum og skyldum. Tað er einans Posta, ið hevur loyvi at framleiða frímerkir og at bera brøv út undir 100 gram. Útberingin av pakkum, bløðum og reklamum er í kapping.

**Viðkomandi marknaður**

Kappingareftirlitið metir, at viðkomandi marknaður er útbering av lýsingum og dagbløðum. Kappingareftirlitið hevur einans skilmarkað marknaðin gjøgnum eftirspurningsvaraseting. Kappingareftirlitið hevur ikki mett tað verða neyðugt at kannað, um marknaðurin kann skilmarkast breiðari gjøgnum eftirspurningsvaraseting, eftir at Kappingareftirlitið er komið til ta niðurstøðu, at grundarlag er til staðar at geva eina negativ-váttan.



Posta hevði í 2009 eina marknaðarráðandi støðu á viðkomandi marknaði og eftir at útberingarvirksemi hjá Prentmiðstøðini er hildið uppat, er Posta at kallað einaráðandi á marknaðinum.

**Málslýsing / meting**

Tann 7. juni 2010 var Kappingareftirlitið á kunningarfundi við Posta, har kunnað var um, at Posta og Prentmiðstøðin vóru í samráðingum um, at Posta skuldi yvirtaka útberingarvirksemi hjá Prentmiðstøðini, kallað "Bera".

Orsøkin var, at útberingarvirksemi hjá Prentmiðstøðini ikki longur hekk saman fíggjarliga, og fyritøkan sá ikki annan útveg enn at niðurleggja virksemi. Hinvegin hevur Prentmiðstøðin eisini grafiska uppseting og prenting um hendi, td. dagbløð og lýsingar. Fyritøkan ynskti framhaldandi at halda fram við hesum virkseminum og tískil hevði fyritøkan sett seg í samband við Posta útbering. Tvs. at ein kundi, ið hevði avtalu við Prentmiðstøðina um bæði prenting og útbering "framhaldandi" kann hava slíka heildaravtalu, men tað hereftir er Posta, ið vegna Prentmiðstøðina tekur sær av útberingini. Kundin kann tó eisini gera avtalu við Prentmiðstøðina, ið bert fevnir um prenting, og seravtalu um útbering beinleiðis við Posta.

*Samanlegging § 13*

Kappingareftirlitið hevur viðgjørt spurningin hvørt avtalurnar millum Posta og Prentmiðstøðina eru at meta sum samanlegging og sostatt eiga at vera viðgjørdar sambært reglunum um samlegging sambært § 13 í kappingarlógini.

Skálatrøð 20 · P.O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 35 60 40 · Fax +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

Um ein outsourcing avtala[2] førir við sær, at eitt virkisøki verður yvirtikið kunnu hesar avtalur í ávísum føri vera fevndar av § 13 í kappingarlógini.

Tað framgongur nevniliga av § 13, at um fult ella lutvíst ræðið fæst í pørtum av eini fyritøku, er eisini talan um samanlegging. Í lógarviðmerkingunum til § 13 verður ikki komið nærri inn á nær yvirtøka av parti av eini fyritøku er at meta sum ein virkisyvirtøku.

Í *Konkurrenceloven med kommentar*[3] verður sagt um outsourcing- avtalur, at hesar kunnu býtast í tveir bólkar. Einfalda outsourcing- og ikki-einfaldar outsourcing avtalur. Einfaldar outsourcing avtalur eru tær, har ein fyritøka avtalar við veitara um at fremja ávísar uppgávur, sum fyritøkan fyrr hevur framt sjálv. Orsøkin til at talan ikki er um samanlegging er, at veitarin ikki fær ræðið á nøkrum ognum og/ella starvsfólki. Tí er ongin broyting farin fram á marknaðinum.

Tá talan er um ikki-einfalda outsourcing-avtalu fær veitarin ræðið á ognum og/ella starvsfólkum. Í tílíkum føri kann talan vera um samanlegging eftir § 13, um tær ognir og/ella starvsfólk sum veitarin fær ræðið á, kunnu skapa ein umsetning, og tí kunnu metast at verða ein fyritøku í sær sjálvum.

T.e. at tað, sum ognað er, skal verða ein somikið fullkomin búskaparlig eind, at tað við stuttum skotbráið í sær sjálvum kann skapa ein umsetning.

Í verandi máli er talan um at fyritøkan, Prentmiðstøðin, hevur avgjørt at steðga egnum útberingarvirksemi og hevur ístaðin avtalað við veitaran og fyrrverandi kappingarneytan, Posta, um at taka sær av allari útbering hjá Prentmiðstøðini. Partarnir hava somuleiðis avtala, at Posta yvirtekur 5 bilar og navnið "Bera", fyri 500.000 kr.

Mett verður at talan er um eina ikki-einfalda outsourcing – avtalu, sum møguliga kann verða fevnd av § 13 í kappingarlógini. Avgerandi fyri hesum er, um tær ognir sum skifta eigara í sjálvum sær eru at meta sum umsetningsberandi ognir.

Í hesum føri er veitingin ein tænastuveiting, og tá er treytin fyri, at out-sourcing avtalan er at meta sum samanlegging, at veitarin eisini fær ræðið á know-how, tvs. starvsfólki og møguligum rættindum. Sambært avtaluni yvirtekur Posta ikki nakað starvsfólk ella annað, sum kann síðustillast við know – know. Mett verður tískil, at talan er um eina vanliga tænastuavtalu og ikki samanlegging, óansæð at ávísar ognir skifta hendir. Posta hevur harumframt eisini upplýst, at tað ikki er ætlanin at nýta sniðið "Bera" framyvir.

Prentmiðstøðin hevur í uml. hálvtannað ár navngivið sítt útberingarvirksemi "Bera". Verður hugt nærri eftir hesi eind sæst, at talan á ongan hátt er um ein sjálvstøðuga búskaparliga eind. Eindin, "Bera", ber einans tað út, sum Prentmiðstøðin prentar. Talan er sostatt ikki um ein eind í Prentmiðstøðini, sum hevur eitt umsetningsberandi virksemi.

Við støðið í omanfyristandandi verður mett at <u>talan ikki er um samanlegging</u> í kappingarlógarhøpi

*Kappingaravlagandi avtalur*
Kappingarlógin § 6 stk. 1 og 2:
*"**§ 6.** Ikki er loyvt fyritøkum v.m. at gera avtalur, ið beinleiðis ella óbeinleiðis hava til endamáls ella sum fylgju at avmarka kappingina.*
*Stk. 2. Avtalur eftir stk. 1 kunnu t.d. vera: 1) at áseta keyps- ella søluprísir ella aðrar viðskiftatreytir, 2) at avmarka ella stýra framleiðslu, sølu, tøkniligari menning ella íløgum,*

[2] T.e. at ein fyritøka gevst við einum innanhýsis virksemi fyri heldur at keypa hesa tænastu frá aðrari fyritøku
[3] Konkurenceloven med kommentarer af Kirsten Levinsen mfl. (árg.: 2008, síða 996)



Skálatrøð 20 · P.O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 35 60 40 · Fax +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

*3) at býta sundur marknaðir sínámillum ella veitingarkeldur,*
*4) at áseta ymiskar treytir fyri veitingum, ið hava sama virði, mótvegis handilsfelagum, sum av tí verða verri fyri í kappingini, ella*
*5) at seta sum treyt fyri at gera eina avtalu, at avtaluparturin eisini góðkennir ískoytisveitingar, sum hvørki natúrliga ella sambært handilssiðvenju hava samband við ætlaða keypið.*
*6) At tvær ella fleiri fyritøkur samskipa teirra kappingarligu atferð við at skipa eitt joint venture, ella*
*7) at seta bindandi prísir á víðarisølur ella á annan hátt at virka fyri, at ein ella fleiri fyritøkur ikki víkja frá vegleiðandi søluprísum."*

Prentmiðstøðin hevur seinastu 12 árini selt tænastu til lýsarar, har útbering var ein partur av tænastuni. Nú velur Prentmiðstøðin at umleggja sítt virksemi, men ístaðin fyri at boða sínum kundum frá, at ongin útbering verður í framtíðini, verður avtala gjørd við uttanhýsis veitara um útbering. Á henda hátt kann Prentmiðstøðin framhaldandi veita sínum kundum somu tænastu sum áðrenn.

Tað hevur verið sagt í fjølmiðlunum at kappingin við hesum verður avmarkað. Spurningurin er um hetta er heilt rætt. Við avtaluni fer Prentmiðstøðin frá at verða eitt virki við eini fíggjarligum tungum útberingarvirksemi, til at verða størsti keyparin av flutningi av lýsingum og dagbløðum hjá Posta. Tað er tí ivasamt um henda avtalan ávirkar prísin á útberingini neiliga.

Somuleiðis er tað neyvan ivamál um, at sannlíkindi fyri hægri prísum á útbering eru størri, um avtalan ikki verður gjørd, tí tá skuldi hvør einstakur lýsari avtala prís við Posta. Undir tílíkum umstøðum vildi Posta kunna nýtt sína tingingarmegi til at pressa prísirnir upp.



Avtalurnar millum Posta og P/f Prentmiðstøðina eru avtalur um tænastuveiting, har Prentmiðstøðin keypir útbering frá Posta heldur enn at hava egna útbering. Talan er sostatt um eina loddrætta avtalu og hesar eru sjáldan ein hóttan fyri kappingina.

Tað er ikki sjálv avtalan um útbering sum førir til, at kappingin minkar, men avgerðin hjá Prentmiðstøðini um at steðga sínum útberingarvirksemi. Avtalan millum Prentmiðstøðina og Posta um útbering hevur sostatt í sjálvum sær ikki negativa ávirkan á kappingina. Tvørturímóti vil avtakarasíðan standa sterkari nú, enn um avtalan ikki verður gjørd. Verður avtalan ikki góðkend, stendur hvør lýsari einsamallur mótvegis Posta.

Havast skal í huga, at Prentmiðstøðin til ein og hvørja tíð hevur rætt til at niðurleggja sítt virksemi uttan at Kappingareftirlitið kann steðga hesum.

Vísandi til § 9 í kappingarlógini metir Kappingareftirlitið at fráboðaðu avtalurnar gjørdar millum Posta og Prentmiðstøðina sambært viðurskiftum, ið Kappingareftirlitið hevur kunnleika til, ikki koma undir forboðið í kappingarlógini § 6, stk. 1, og sostatt er grundarlag at geva eina negativ-váttan.

**Niðurstøða**
Vísandi til § 9 í kappingarlógini er Kappingaráðið komið til ta niðurstøðu, at fráboðaðu avtalurnar gjørdar millum Posta og Prentmiðstøðina sambært viðurskiftum, ið Kappingarráðið hevur kunnleika til, ikki koma undir forboðið í kappingarlógini § 6, stk. 1, og tað tí ikki er orsøk at geva boð sbrt. § 6, stk. 4.

**Kæruvegleiðing**
Avgerðir tiknar av Kappingarráðnum eftir m.a. §§ 6 og 9 í kappingarlógini kunnu kærast til:

Skálatrøð 20 · P.O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 35 60 40 · Fax +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Vinnukærunevndina,
c/o Føroya Kærustovnur
Undir Hornabakka
Postsmoga 45
Fo-110 Tórshavn

Kærufreistin er 4 vikur eftir móttøku av hesum skrivi.

Vegna Kappingarráðið

Ingunn Ó. Eiriksdóttir
formaður

/Sigurd Rasmussen
fulltrúi



Skálatrøð 20 · P.O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 35 60 40 · Fax +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo